*Lagt til rættis:*
*Sunneva H. Eysturstein*
*post@sosialurin.fo*



# p avstað

skráin var full. Alt hetta gekk upp, sjálvt um odsini vóru ímóti. Eg vildi mett, at mann náddi hetta uppá uml tvey ár, men vit eru her nú, sjálvt um bólkurin ikki eingongd er eitt ára gamal. Eitt blaðfólk fyri Billboard Magazine kærdi okkum enntá at vera »evenings best act« tað eina kvøldið á Iceland Airwaves, og tað er eitt stórt herðaklapp at fáa.

- Vit hava tó ikki bara havt eydnuna við okkum. Vit hava fingið nógv fleiri nei enn ja. Men vit velja at síggja tað positiva og at brúka tað til at koma longur fram, tí tú fært einki burturúr at seta teg at stara í eitt nei. Tú steðgar upp, um tú gert tað. Tú mást bara leypa avstað, halda høvdið kalt og gera tað, sum tú vilt.



*- Tú steðgar upp, um tú setur teg at stara í eitt nei. Tú mást bara leypa avstað, halda høvdið kalt og gera tað, sum tú vilt, sigur Filip Mortensen, sangari og gittarspælari í The Ghost*

*Mynd: Astrid Mohr*

### Lokkandi sáttmálar

- Vit hava fingið nøkur tilboð um plátu- og promotionsáttmála. M.a frá Sunday Best, sum er eitt útgávufelag hjá BBC Radio 1. Hetta er ein góður sáttmáli, ið inniheldur nógv spennandi, m.a at blíva promoveraður í París við serligum konsertum, har ið mong stór nøvn, sum t.d Mika hava framført. Tað er ógvuliga lokkandi at taka av beinanvegin, men okkara bakland hevur rátt okkum til at bíða eitt sindur, tí sáttmálin kann blíva enn betri, sigur Filip.

- Um teir veruliga vilja, so geva teir okkum betri sømdir. Og eru hesir ikki við uppá at bjóða meira, so eru onnur, ið liggja klár við einum dokumenti til okkum, ið gevur okkum størri og betri møguleikar. Vit mugu sjálvandi velja tað besta. Tí ansar mann ikki eftir, kann mann enda við at vera fastur í einari avtalu, ið kundi verið nógv betri, leggur Urbanus afturat.

### Stjørnurnar hugsa eins

Filip skrivar tekstirnar, Urbanus ger programmeringarnar. Onkuntíð báðir, onkuntíð ein. Tað er pláss til báðar, sum er ógvuliga gott, tí teir eru ymiskir. Hendan samansetingin av mótpólum skapar eitt egið ljóð, ein samleika, ið sker seg burturúr og ikki ljóðar sum nakað annað.

- Tá vit skriva tónleik, er tað oftast soleiðis, at eg finni uppá eitt riff. Urbanus kemur við einari programmering, og so kemur teksturin. Ofta hugsi eg, at tað er eitt sindur amatørsligt at gera tað uppá ein so tilvildarligan máta. Men tá vit vóru á Iceland Airwaves, fingu vit staðfest, at tað er soleiðis hjá øðrum eisini. Vit møttu Bloc Party í einari barr og settu okkum at práta. Eg mátti spyrja teir, hvussu teir gera, tá teir gera tónleik, og eg fann útav, at teir hugsa akkurát líka sum vit, tá teir skriva sangir. At tú finnur uppá eitt riff, og so tekur tú tað víðari. Tað er stuttligt at finna útav, at tað ikki er so nógv øðrvísi hjá stjørnunum. At ein kann relatera til so kendar persónar, sigur Filip smílandi.

### Tá himmalin dettur niður

Spurdur, hvør boðskapur liggur í tekstunum, sigur Filip heilt greitt:

- Ein segði við meg einaferð, at tú selur meira, um tú skrivar fúlar og ógvusligar tekstir. Eg svaraði, at tað vil eg ikki, tí tað er ikki tað, ið eg føli. Eg skrivi tekstir um kenslur, tankar og samfelag við fólk. Ein stórur partur av boðskapinum er andaligur. Um at Gud kennist nær ella langt burturi, men í grundini er tað andaligt, óansæð hvat evni, talan er um. Eg var eitt sindur bangin fyri at hava tann religiøsa boðskapin við at byrja við, men fólk hava verið positiv mótvegis hesum. Eg haldi, at tað er tí, at tað andaliga verður brúkt súmbolskt, soleiðis at fólk, ið ikki eru trúgvandi, eisini kunnu relatera til tað. Td í reglunum »I must be ready to see the sky fall down« og »Don't fear the lions« liggur nógv meira goymt enn bara ein andalig uppfatan. At tú ikki skalt óttast forðingar. At einaferð endar heimurin, og hvat hendir so?

### Nógv jørn í eldinum

- Vit spæla ikki so nógv í Føroyum fyri tíðina, men royna at fáa so nógvar møguleikar úti um landoddarnar, sum gjørligt. Vit hava júst verið í London og spælt tvær væleydnaðar konsertir. Harav eina, sum plátufelagið Wall of Sound,  ið m.a gevur út fyri Röyksopp og Mogwai, skipaði fyri. Ein, ið arbeiðir har, kontaktaði okkum, tá hann hevði sæð okkum á einum hitt-lista hjá NME (Tónleikablað í Onglandi síðani '50ini, blaðkv) beint undir Justin Timberlake. Honum dámdi væl okkara tónleik og bjóðaði okkum yvir, svarar Urbanus, tá eg spyrji teir, hvat teir eru í gongd við í løtuni. Filip greiðir víðari frá um, hvat fer at koma næst.

- Í vikuskiftinum skulu vit spæla í Århus Pakhus og á Nordklang Festival í Sveis. Í apríl skulu vit til Danmarkar at framføra við Boys in a Band á Norðuratlantsbryggjuni. Í juni til Glasgow. Vit hava fingið management samstarv í lag við SpotOn, hava samskifti við fleiri feitar bólkar um konsertferðir, remiksing av tónleiki og samstarv yvirhøvur. M.a við nøvn sum As in Rebekka Maria úr Danmark, Ra Ra Riot úr Amerika, FM Belfast og Jezebel úr Íslandi og Quit your Dayjob úr Noregi.

- Vit hava nógv jørn í eldinum í løtuni og fara at leggja alla orku í at fáa okkara tónleik út til fólk. Eg brúki nógva tíð uppá at fáa samband við fólk runt í heiminum, sum eru í tónleikavinnuni, at sleppa at spæla ymsastaðni og yvirhøvur at kasta nakrar bóltar upp í luftina og kanna av, hvør er við uppá at lofta teimum. Tað skal nógvur vilji og orka til, um nakað skal henda, og um tað skal henda skjótt. Og tí eru vit altíð til reiðar at leypa avstað, tá onkur kallar. Tá onkur kallar, merkir tað nevniliga, at fólk hava áhuga í okkum og vilja hoyra okkara tónleik. Og tað er einki, sum slær hesa lekru kensluna, ið tú fært, tá fólk vilja hava tað, ið tú gert.

## Komandi fløgur

**Kaizers Orchestra**



**Heiti:** »Maskineri«
**Útgávudagur:** 18. februar 2008
**Stutt um:** »Maskineri« er klaverrútmur og Kaizershuglag, sum vit kenna tað. Hon hevur nýggj, etnisk løg og hugskot í hasum vælsignaða haminum, sum ongantíð fær teg at ivast í, hvørt tað er Kaizers Orchestra, tú hoyrir ella ikki. Ein spennandi útgáva afturat teimum áður útkomnu, spennandi útgávunum.
**Staklag:** »Enden av november«
**Plátufelag:** Kaizerecords
www.myspace.com/kaizerso
Keyp fløguna á iTunes

**Under Byen – Live EP við Danmarks Radio Symfoniorkester**



**Heiti:** »Siamesisk«
**Útgávudagur:** 18. februar 2008
**Stutt um:** »Siamesisk« er ein live konsert við fýra løgum á. Er upptikin í apríl 2007 í Keypmannahavn, tá Under Byen hevði konsert saman við symfoniorkesturinum hjá Danmarks Radio. Fløgan verður útgivin í 2000 eintøkum í Danmark og 2000 eintøkum í Canada, umframt eisini digitalt og á vinyl.
**Plátufelag:** Morningside records
myspace.com/underbyen
Keyp fløguna á iTunes, amazon.com ella beinleiðis av teirra myspace síðu.

**Goldfrapp**



**Heiti:** »Seventh Tree«
**Útgávudagur:** 25. februar 2006
**Stutt um:** Alison Goldfrapp og Will Gregory manna duoina Goldfrapp, ið (eftir eitt stórt kommersielt gjørgnumbrot við diskoinspireraðu elektronika útgávuni »Supernature« í 2005) nú venda aftur til sveimandi, ambienta ljóðið, ið tey byrjaðu sína tónleikakarrieru við fyri nýggju árum síðani. Seinasta útgávan seldi yvir eina millión eintøk, og vónirnar fyri komandi útgávuna eru eins høgar.
**Staklag:** »A&E«
**Plátufelag:** Mute Records
myspace.com/goldfrapp
Keyp fløguna á recordstore.co.uk/goldfrapp ella á iTunes

**Janet Jackson**



**Heiti:** »Discipline«
**Útgávudagur:** 26. februar 2008
**Stutt um:** R&B drotningin gevur í hesum mánaðinum sína tíggindu studiofløgu út. Hesaferð í samstarv við framleiðaran og stjóran á Island Records, L.A Reid. Ljóðið, ið Miss Jackson og Reid hava lagt seg eftir, er tað ráða, elektroniska, ið dominerar popp-heimin í løtuni (dømi: »Blackout« hjá Britney Spears) Singlurnar vísa tað eitt sindur, men um tað veruliga er eydnast, kemur í ljós um góðar tvær vikur.
**Staklag:** »Feedback« og »Rock With You«
**Plátufelag:** Island Records
myspace.com/janetjackson
Keyp fløguna á iTunes ella á amazon.com